

### 5 teir bestu við Finni Jensen

# Bestu trubadur løgini

**Vit hava biðið trubadurin og hittsmiðin Finnur Jensen um at velja tey bestu løgini, ið hann hevur spælt.**

**Niels Uni Dam**
nielsuni@sosialurin.fo



5 teir bestu

Finnur Jensen fekk sítt veruliga gjøgnumbrot á føroyska tónleikapallinum í bólkinum Páll Finnur Páll. Sum lagasmiður handan størstu landapláguna í nógv ár Forelskaður sjónleikari, vísti dámligi ungi sangarin og sangskrivarin, at hann hevur gott oyra fyri fangandi poppløgum, og at hansara tekstir eru meistarligir. Hansara gávur sum sangskrivari og sangari bóru hann í finaluna í fyrstu singer/songwriter kappingini í Hafnia Lounge.

Í Páll Finnur Páll hevur Finnur skrivað orð og tónleik til báðar fløgurnar umfram nýggju fløguna, ið bólkurin arbeiðir við í løtuni. Finnur eigur sín stóra leiklut í støðuni hjá Páll Finnur Páll, sum er eitt slag av arvingi til trúnuna hjá Frændum sum Føroya besti syngiðvið-bólkur.

Men Finnur hevur eisini roynt seg í øðrum samanhangum. Bæði sum einstaklingur og saman við Ronni Poulsen, Høgna Reistrup ella Páll Oddur Rubeksen, hevur Finnur spælt óteljandi barrkvøld í føroyskum barrum og seinnu tíðina eisini í Danmark. Hann hevur eina stóra og fjølbroytta spæliskrá við bæði føroyskum og útlendskum løgum, ið hann tulkar sera sannførandi.

Vit hava biðið Finnur Jensen um at kava niður í spæliskrá sína og velja tey fimm bestu løgini, ið hann hevur spælt. Her er frítt val, um hann velur heimagjørd ella lániløg, bara hann velur tey, ið hann sjálvur metir vera tey bestu. Av nógvum verður t.d. forelskaður sjónleikari mettur at vera eitt av bestu nýggjaru føroysku løgunum, so tí er hetta ein møguleiki, men Finnur hevur ikki valt hetta lag.

*Finnur sigur:*

- Eg havi valt at spæla løg, sum mær dámar at spæla sum trubadurur, altso ikki í Páll Finnur Páll samanhanginum, men løg sum eg spæli einsamallur ella saman við onkrum øðrum trubaduri.

## Here Comes the Sun – The Beatles

Here Comes the Sun er eitt lag, sum mær dámar øgiliga væl at spæla. Men eisini eitt lag mær dámar væl at lurta eftir. Eg haldi hetta lag vera eitt tað besta lagið hjá The Beatles. George Harrison er mín persónligi favorittur av beatlunum.

Serliga er gittarspælið gott í Here Comes the Sun. Tú sleppur at vísa, hvussu góð tíni gittarkynstur eru. Ikki tað, at eg haldi meg vera nakran gittarsnilling, men serliga væl riggar tað, tá vit eru tveir ella tríggir, sum spæla saman.

Tað melodiska verður vektað framum tekstin í lagnum. Men teksturin hevur eisini okkurt, sum ger fólk glað. Haldi tað var George Harrison sjálvur, sum segði, at hann hevði skrivað lagið um várið, tá sólin byrjar at koma fram aftur. So tá eg síggi fyrstu sólstrálurnar um várið, so hugsi eg Here Comes the Sun.






## Wonderwall, Oasis

Wonderwall hjá Oasis dámar mær av eitt sindur meira persónligum grundum. Wonderwall var ein tann fyrsti sangurin, sum eg lærdi at spæla á gittar. Tey tosa um Oasis-akkordir, tað er tá tú heldur lítlafingri og ringfingri føstum á báðum niðastu streingjunum og flytir hinar fingrarnar. Tað ljóðar væl beinanvegin, so sangurin er serliga væl egnaður hjá nýbyrjarum. Tú lærir hann lutfalsliga lætt, og tað ljóðar beinanvegin lutfalsliga væl. Harafturat kennir fólk eisini væl lagið, eg haldi, hetta man vera kendasta lagið hjá Oasis.



## Súrligar nætur í Keypmannahavn, Kára P.

Súrligar nætur í Keypmannahavn er melodiskt eitt øgiliga gott lag. Tað er serliga nú eftir, at eg eri fluttur til Danmarkar, at lagið er farið at hava ein serligan týdning fyri meg. Búgvi ikki í Keypmannahavn, men eri ofta har. Tað er kanska eisini tað, at man hevur havt onkra heita song at fara heim í, tá man hevur verið í Keypmannahavn – í øllum førum í fyrstani. Eg verði rørdur, hvørja ferð eg spæli lagið. Havi eisini lagt til merkis, at útisetum dámar lagið væl serliga inni á Skarv. Vil ikki pástanda, at eg spæli tað líka væl sum Kári P. Men eg havi loyvt mær at lána tað. Eg haldi serliga, at teksturin í lagnum riggar væl. Tað er eisini gott, at man kann taka munnharmonikuna fram, tá man spælir tað. Tað havi eg gjørt nakrar ferðir, eg dugi ikki so væl, men tað er stuttligt.



## Subterranean Homesick Blues, Bob Dylan

Mær dámar øgiliga væl at spæla Bob Dylan, serliga tá eg spæli einsamallur. Hann hevur øgiliga nógv góð løg, so tað er torført at velja, men um eg skal velja eitt, so verður tað Subterranean Homesick Blues. Bob Dylan er altíð eitt sikkurt hitt serliga millum eldru áskoðararnir. Eg haldi, at teksturin lýsir Bob Dylan nokkso væl. Hetta er early Bob Dylan, eitt sindur samfelagsrevsandi og um arbeiðaran. Tað vísir seg eisini, at hetta eru løgini, sum gerast klassikararnir. Akkordirnar eru einfaldar, men lagið er alíkavæl ein avbjóðing. Hann tosar sum eitt vatnfall, og tað er sera avbjóðandi fyri røddina. Eg haldi ongantíð, at eg havi klárað at tosa alt lagið út í eitt uttan at byrja at mutla. Plagi at royna at herma eitt sindur eftir Bob Dylan, tá eg spæli tað. Mær dámar væl, at eg sleppi at geva lagnum eitt sindur av attitydu ístaðin fyri, at tað er pent.

## Ring of Fire, Johnny Cash

Mær dámar øgiliga væl Johnny Cash, og eg plagi at spæla nógv hjá honum. Serliga eftir filmin Walk The Line eru fólk farin at dáma tað væl. Ring of Fire er nokk kendasta lagið hjá honum. Tað er okkurt fangandi við at spæla Cash. Man kann koyra eitt sindur av attitydu í framførsluna, herma eftir djúpu røddini hjá honum. Fólk situr við einum smíli, tí tey verða undirhildin. Tað riggar væl at spæla hann einsamallur, men tað er eitt sindur meira av GO í, tá man hevur fleiri røddir. Teksturin er um kærleika, um tað at falla fyri onkrum og søkka so djúpt, at tað brennur, og tílíkt er altíð gott at syngja um.

